# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 24.01.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi
Ikki møtt: Ronni Hammer
Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 7.

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Svimjifelag.**
   Søkt verður um stuðul til virksemi felagsins, m.a. til kappingar og venjingarlegur uttanlands.
   **Fíggjarnevndin 24.01.2022:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 5.000,00 í ár.
   **Avgerð**:
   Einmælt samtykt.

2. **Umsókn um sundurbýti/samanlegging matr. nr. 131a og 219a, Hvalba til ummælis.**
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at beina málið í Teknisku nevnd.

3. **Umsókn um byggiloyvi til bilhús matr. nr. 336b, Hvalba.**
   Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 336b varð givið í oktober 2016 sambært umsókn v.m., treytað av, at eigaraviðurskiftini vóru í lagi.
   **Tekniska nevnd 17.01.2022:**
   Nevndin mælir til at geva byggiloyvi sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at staðfesta byggiloyvið frá 2016, sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, nú marknaumskipanin er framd.

4. **Umsókn um byggiloyvi til sethús matr. nr. 524l, Hvalba.**
   Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 524l, Hvalba.
   **Tekniska nevnd 17.01.2022:**
   Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.

**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 524l sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17.

5. **Umsókn um byggiloyvi til skúr matr. nr. 244, Hvalba.**
Umsókn um byggiloyvi til skúr til goymslu av fóðri og amboðum á trøðini, matr. nr. 244, Hvalba.
**Tekniska nevnd 17.01.2022:**
Nevndin mælir til at geva byggiloyvi sambært tilmæli hjá byggimálsviðgeranum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til skúr og goymsluhús á matr. nr. 244 í Hvalba sambært umsókn og givnum upplýsingum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi.

6. **Umsókn um byggiloyvi til neyst matr. nr. 261, Hvalba.**
Umsókn um uppafturbygging av neysti, har teir nýggju múrarnir verða settir eins og teir gomlu standa.
**Tekniska nevnd 17.01.2022:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá byggimálsviðgeranum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til uppafturbygging av neysti á matr. nr. 261 sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi.

7. **Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum.**
Reglugerðin er løgd fram á borgarstjórafundi tann 19.11.2021, har semja var um at leggja hesa fyri øll kommunustýrini.
**Vega- og havnanevndin 06.12.2021 og 19.01.2022:**
Nevndin mælir til, at bygdarráðið tekur undir við hesari reglugerð.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.50

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Niels Olaf Eyvindsson | Eir J. Norðberg |
| Gunnhild Mortensen | Thorstein Thomsen | Martin í Nesi |